# Heri vann 10. ferð á rað

**Heri Ziska vann aftur bronsu í sleggjuvarpi, og gleðin um hetta tóktist vera størri enn vanligt**

SLEGGJUVARP
*Jákup Mørk/
Álvur Haraldsen
– Isle of Man*

Talan var nevnliga um 10. kapping upp í slag í Oyggjaleikahøpi, har Heri hevur ognað sær heiðursmerki, og sum vera man, var hann eisini sera errin um hetta, tá kappingin var av.

- Hetta hevur verið ein heilt serlig medalja. Tá eg taldi eftir seinastu Oyggjaleikir, hevði eg vunnið níggju heiðursmerki á rað, so hetta er nakað, sum eg havi miðjað eftir í tvey ár. Tá eg varð skaddur í fjør summar, var eg um rappi at kasta alt frá mær, men soleiðis bleiv tíbetur ikki.

### Kappaðust um bronsuna

Besta kastið hjá Heri var 44,51 metrar, og hóast hetta var nakað minni, enn Heri plagdi at kasta, so var hann kortini nøgdur.

- Allir kastaðu einar tveir metrar minni enn vanligt, so tað er allar helst í lagi, vil eg siga. Ringurin at kasta úr var ógvuliga seinur, og tá eg sjálvur eri heldur seinur, so er tað eyka torført hjá mær. Heldur ikki havi eg kunna vant stigini hjá mær orsakað av skaða, so alt í alt hevði eg torførar umstøður. Tíbetur gekk tað so kortini.

At talan ikki gjørdist um meira enn bronsu, var at kalla nakað, sum Heri visti av frammanundan. Vinnarin av kappingini hevur júst vunnið bretska U-23 meistaraheitið, og kastaði einar fimtan metrar meira enn Heri.

- Vit vistu undan kappingini, hvør fór at vinna gull og silvur, so kappingin hjá okkum øðrum stóð um triðja plássið, og tað er altíð stuttligt at vinna ta kappingina.

### Gevur ikki medaljuna

Næsta kappingin hjá Hera verður klingruvarpið, sum er á skránni hósdagin, og her tykist Heri eisini at hava hampuligar vónir.

- Tað verður spennandi. Støðan er hin sama. Orsakað av skaðanum í hondini, sum eg fekk í fjør, havi eg ikki fingið vant nóg nógv, og onkrar av mótstøðumonnunum kenni eg slettis ikki, umframt at onkrir av teimum, sum vóru við fyri fyrstu ferð fyri tveimum árum síðani, helst hava tikið seg fram.

- Eg kasti heldru ikki so langt sjálvur, sum eg gjørdi fyri tveimum árum síðani, men sum vindurin var í dag, so hóskaði hann sera væl til mín.

Undir øllum umstøðum, so hevur Heri eitt gullmerki at verja, og tað ætlar hann sær so eisini.

- Teir skulu í øllum førum ikki vænta, at eg fari at geva teimum medaljuna, sigur Heri at enda, tá hetta seinasta verður havt á lofti.



*Eftir kappingina var Heri skjótur at ringja heim, so tey nærmastu fingu at vita, at hann hevði endurvunnið bronsumerkið hjá sær í sleggjuvarpi*

# Bronsa í Badminton

**Bert triðja heiðursmerki í badminton kom til høldar týsdagin, tá Erlan Poulsen tryggjaði sær bronsu í einmansleiki**

BADMINTON
*Jákup Mørk/
Álvur Haraldsen
– Isle of Man*



*Týskvøldið vann Erland Poulsen triðja føroyska heiðursmerkið í badminton á Oyggjaleikum, og einki er at siga til, at fagnaðurin um hetta var stórur*

Úrslitini í liðkappinini í badminton vóru so als ikki tey, sum føroysku leikararnir høvdu vónað, og í blaðnum í gjár viðgekk landsliðsvenjarin eisini, at hann var sera vónsvikin.

Hann legði tó dent á, at vónandi kundi hetta seta leikararnar eyka nógv upp til einmansleikirnar, og eftir úrslitunum at døma, so hevði hann eisini rætt í hesum.

### Kundu verið tvey

Tað gekk nevnliga sera væl í einmansleikinum hjá bæði Erlandi Poulsen og Ragnari Rasmussen. Báðir vunnu teir seg fram til fjórðingsfinaluna, men her mátti hann kortini lúta fyri Mininnguaq Kleist.

Hevði Ragnar vunnið hendan dystin, hevði talan verið um tvey føroysk heiðursmerki, tí tað eydnaðist nevnliga Erlandi at vinna sína fjórðingsfinalu, og hóast hann í hálvfinaluni mátti lúta fyri Frank Bagger, so vóru heiðursmerkini tryggjað við hesum. Í badminton verður nevnliga ikki leikt um bronsuna.

### Spæli sítt spæl

Einki er at siga til, at fagnaðurin í badminton leguni var stórur eftir hetta, tí við hesum vann Erland bert triðja føroyska heiðursmerki í badminton á Oyggjaleikum yvirhøvur.

Okkum eydnaðist ikki at fáa fatur á Erlandi, sum skiltist á teimum í badminton leguni, so gekk spælið hjá Erlandi framúr. Simons Gaines, sum Erland basti í fjórðingsfinaluni, er ein rættiliga stinnur leikari, men Erland spældi bara sítt egna spæl alla tíðina, og vann eisini ein sanførandi 2-0 sigur. At hann so mátti lúta í hálvfinaluni, er sjálvandi at iðra seg um, men kortini kann avgjørt sigast, at øll í leguni vóru væl nøgd um samlaða avrikið í einmansleikinum.



# 3 føroyingar í 1/8-partsfinaluni



*Bert 14 ára gamli Rókur Nielsen vísti sera góð evni, og millum annað gav hann einum sera sterkum leikara av Isle of Man harða mótstøðu í einum dysti, har Rókur hevði settbólt*

**Hýrurin millum føroysku borðtennisleikararnar var ikki nakað serligur eftir liðkappingina, men eftir einstaklingadystirnar týsdagin hava føroyingar tríggjar leikarar í 1/8-partsfinaluni.**

BORÐTENNIS
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Tað hevur ikki gingið so væl hjá borðtennisleikarunum í liðkappingini sum vónað.

Sunnudagin leiktu føroyingar sum kunnugt móti Saarema og vunnu 6-1. Men seinna dystin hendan dagin varð taptur 5-2 móti Guernsey. Hetta var tó ikki heilt óvæntað, tí Gurensey er rímiliga sterk oyggj í borðtennishøpi. Veruliga vónbrotið kom ikki fyrr enn mánadagin, tá føroyingar møttu Grønlandi.

Dystirnir millum hesi londini hava seinastu árini verið ógvuliga javnir, og soleiðis var eisini hesaferð. Avgerðin skuldi fella í næstseinasta dystinum, sum var blandaður tvímansleikur. Føroyingar tapru hendan dystin 21-18 í triðja setti. Men við til søguna hoyrir eisini ein dómarafeilur, sum er rættiliga óvanligur, og sum var Grønlandi til fyrimuns.

Tað sum hendi var í stuttum, at føroyingar servaðu eina servu, sum grønlendingar ikki tóku, tí teir hildu hon var skeiv. Føroyingar hildu tó uppá, at servan var røtt. Sum rímiligt er kundi dómarin illa síggja, hvørju megin bólturin var, men í staðin fyri at døma umbólt, sum í slíkum føri sjálvandi er einasta rætta, gav hann Grønlandi stigið. Støðan undan var 16-17 til Grønland, og við hesum "ókeypis" stiginum gjørdist 16-18.

Hendan óvanliga dømingin ávirkaði eisini føroysku spælararnar, og endina var altso, at Grønland vann setti og harvið eisini samlaða dystin 4-3.

### Týsdagurin góður

Hetta merkti í praksis, at Føroyar samlað gjørdust nr. 7 heldur enn nr. 6. Tað hevur sjálvandi ikki tann stóra týdningin, men tað er altíð ørkymlandi at fáa slíkar avgerðir móti sær.

Tíbetur nervaði hetta ikki einstaklingakappingina, sum byrjaði týsdagin aftaná døgurða. Føroyingar høvdu fýra leikarar við í innleiðandi bólkaspælinum, Petur Niclasen, Finnbjørn Zachariasen, Bergur Jacobsen og hin bara 14 ára gamla Rók Nielsen.

Hesin seinast nevndi er við "fyri at læra". Rókur er ein av fleiri evnaríkum ungum borðtennisleikarum, sum Borðtennissambandið ætlar at satsa nógv upp á komandi árini. Og sum eitt tekin um hetta, er Rókur við á leikunum í ár.

Hann tapti sínar tríggjar dystir, men spældi fleiri góðar bóltar og vísti harvið síni evni. Hann megnaði eisini at geva einum rættiliga sterkum leikara av Isle og Man harða mótstøðú. Annað settið endaði nevniliga 22-24.

Hjá hinum trimum gekst hinvegin betur enn væntað. Allir tríggir megnaðu at leika seg víðari úr bólkunum, Petur beinleiðis í 1/8-partsfinaluna sum nr. 1 í bólkinum. Finnbjørn og Bergur gjørdust báír nr. 2 í sínum bólkum og skuldu tí leika ein kvalifikatiónsdyst í part, fyri at koma í 1/8-partsfinaluna.

Her gjørdist Finnbjørn tíverri og stuttur, men Bergur vann lættliga sín dyst.

### Vón fyri onkran

So samanum tikið var lagið millum føroysku borðtennisleikararnar rættiliga gott í gjár. Eisini hóast tað ikki eydnaðist kvinnunum at vinna nakran dyst í einstaklingakappingini. Men bæði Maria Petersen og Elinborg Nygaard vóru ógvuliga nær við, og báðar vístu í løtum heilt gott spæl.

Mikudagin byrja so tvímansleikirnir hjá bæði kvinnum og monnum og í blandaðum tvímansleiki. Ilt er at meta um, hvussu tað fer at gangast, men vit skulu neyvan væntað tey stóru úrslitini.

Í einmansleiki hjá monnum eru vónirnar ymiskar. Bergur skal í 1/8-partsfinalun i møta ongum øðrum enn Carl Prean, sum áður hevur talst millum stinnastu leikarar í heiminum, og vinnur Petur sín dyst – og tað ger hann væntandi – stendur aftur Prean fyri einum føroyingi.

Hinvegin eru vónirnar fyri Kjartani Eli Hentze betur. Liggur væl fyri, hevur seedingin lagað tað so, at hann kann fara allan vegin í semi-finaluna. Og hvør kann tá siga, hvat fer at henda.

So eftir vónbrotini í liðkappingini sær bjartari út fyri føroysku leikararnar.



*Petur Niclasen hevði nakrar sera harðar dystir í undanbólkinum, men tó samanlagt nummar eitt, og er tí klárur til 1/8 parts finalurnar*



*Bergur Jacobsen vann lættliga sín eyka kvalifikatiónsdyst, og fyri hann verður tað einamest ein uppliving at sleppa at royna seg móti Charles Prean*